# Mannfall hóttir NSÍ

**Gøtumenn eru betri fyri við fólki, enn teir hava verið tær seinastu ferðirnar**

Tað vóru fleiri fótbóltsvenjarar og nógvir spælarar úr øðrum feløgum kring vøllin, tá GÍ mikukvøldið akkurát kom við fullari úrtøku burturúr dysti, sum teir áttu at havt vunnið sannførandi, men sum teir í síðsta enda, tá panikkur var komin í, ikki vóru óhepnir at fáa trý stig burturúr.

Millum áskoðararnar vóru fleiri úr NSÍ. Spurningurin er so, um teir í Runavík fingu uppskriftina, sum skal til at fella væl spælandi GÍ, og harvið at taka síðstu vónina fyri FM heitinum frá teimum.

### Mannfallið

NSÍ hevur fleiri ivamál at dragast við. Í hesi vikuni eru tveir av teimum, sum høvdu verið uppløgd boð til pláss millum teir fyrstu ellivu, farnir til hús, tí teir undir venjing hava fingið liðbandsskaðar í fótinum. Djóni N. Joensen hevur ikki vant síðani týskvøldið. Hann var í gjár roknaður at vera sera ivasamur. Hóskvøldið gavst Brynjolvur Nielsen at venja áðrenn hinir, og hann varð eisini mettur at vera ivasamur.

Tað er greitt, at Kári Hansen ikki spælir aftur í ár. U–18 landsliðsspælarin, Áki L. Hansen, hevur viðhvørt verið á besta liðnum hjá NSÍ. Hann hevur ikki vant í vikuni. Vøddaskaði verður roknaður at halda honum burtur í tríggjar vikur.

### Bartal tøkur aftur

Mikukvøldið var stórur saknur hjá GÍ í leikbannaða Bartali Eliassen. Hann verður við aftur í morgin, og tað er ógvuliga kærkomið hjá GÍ.

Jóan Petur Olsen tóktist vera hálvskaddur, tá hann mikukvøldið vikarieraði í GÍ verjuni. Í 1. hálvleiki bilti ikki, at hann hevði trupulleikar við spurtunum, tí tá var lítið og einki trýst á, men í 2. hálvleiki sást tað væl.

Mikukvøldið varð hálvi føroyingurin og hálvi íslendingurin, miðvallarin Svein Viljálmsson, skiftur inn á liðið hjá GÍ. Hann kom inn í UEFA Cup, men mikukvøldið var fyrsta ferðin, at 18 ára gamli og raski maðurin var við í landskappingini. Hann hevur áður spælt við Sandagerði í 3. deild í Íslandi.

Poul Ennigarð og Henning Jarnskor komu heim úr Danmark til dystin mikudagin. Síðani hava teir verið heima, og teir fara ikki av aftur landinum, fyrrenn dysturin í morgin er spældur.

Hans Pauli Petersen hevur verið skaddur mesta partin av árinum. Hann verður við í hópinum í morgin, og kanska verður hann á vøllinum frá fyrsta bríksli.



*Bartal verður aftur at síggja á GÍ-liðnum sunnudagin, eftir at hava havt leikbann*

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.09 | GÍ-NSÍ | Oddmar Andreasen |
| 16.09 | KÍ-B36 | Niklas á Líðarenda |
| 16.09 | HB-EB/Streymur | Dagfinn Olsen |
| 16.09 | VB-B71 | Birgir Sondum |
| 16.09 | B68-FS Vágar | Petur Skarðenni |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 15.09 | ÍF-Skála | Suni Johansen |
| 15.09 | GÍ-NSÍ | Petur H. Joensen |
| 15.09 | B36-HB | Páll Augustinussen |
| 15.09 | TB-LÍF | Erling Eysturoy |
| 15.09 | KÍ-Sumba | Rúni Gaardbo |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.09 | GÍ-Royn | Jonhard Hansen |
| 16.09 | KÍ-B36 | Dan Højgaard |
| 16.09 | AB-TB | Georg Rasmussen |
| 16.09 | VB-B71 | Petur E. Kjærbo |
| 16.09 | B68-ÍF | Óli Samuelsen |

**1. deild kvinnur**

Frí hetta vikuskiftið

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 15 | 13- 1 - 1 | 51 | 12 | 39 | 40 |
| 2 | GÍ | 15 | 12- 2 - 1 | 46 | 17 | 29 | 38 |
| 3 | B68 | 15 | 8 - 2 - 5 | 30 | 20 | 10 | 26 |
| 4 | KÍ | 15 | 7 - 0 - 8 | 22 | 34 | -12 | 21 |
| 5 | VB | 15 | 6 - 3 - 6 | 32 | 21 | 11 | 21 |
| 6 | NSÍ | 15 | 5 - 4 - 6 | 18 | 20 | -2 | 19 |
| 7 | HB | 15 | 5 - 2 - 8 | 26 | 23 | 3 | 17 |
| 8 | EB/Streymur | 15 | 5 - 1 - 9 | 19 | 28 | -9 | 16 |
| 9 | B71 | 15 | 3 - 1 -11 | 14 | 38 | -24 | 10 |
| 10 | FS Vágar | 15 | 3 - 0 -12 | 16 | 61 | -45 | 9 |

# B71 kann kløkka VB

**Í Vági ber hugburðurin boð um, at venjarin er á veg úr felagnum, og at tað ikki ber til at røkka FM heitinum**

Sandoyingar fara til Vágs í morgin. B71 hevur góð minni úr Vági, har teir í fjør vóru teir einastu, sum vunnu landskappingardyst.

B71 hevur framvegis nógv at spæla um, tí teir eru verri enn so leysir av aftasta plássinum. Um tað eydnast at halda aftasta plássið burtur, so er tað sannlíkt, at kappingarárið verður longt eitt sindur, tí uppflytingardystir verða á skránni.

Hjá B71 eru allir teir, sum hava verið við tær seinastu vikurnar, tøkir aftur. Hans Jørgen Djurhuus var leikbannaður seinast, men hann er tøkur aftur. Julian Floresco hevur bara spælt ein hálvleik síðani summarsteðgin – ímóti B68. Hann er so mikið illa skaddur í knænum, at tað er greitt, at hann ikki fer at spæla aftur í ár.

### VB skal seta seg upp

Í Vági tykjast teir hava funnið seg í, at talan verður ikki um sama skreytið, sum teir vunnu í fjør. Spurningurin er, hvussu veruleikanært tað er at rokna við bronsuplássinum.

Í VB eru teir farnir undir at fyrireika komandi kappingarári. Teir vita, at Popczynski verður ikki venjari, og tað saman við støðuni á talvuni er kanska saman við árstíðini orsøkin til, at hjá royndu spælarunum er hugurin at venja ikki tann sami, sum hann var fyrr í summar.

Tórður Holm hevur ikki vant tær seinastu vikurnar, og hann verður ikki við í morgin. Eingin av hinum VB spælarunum er leikbannaður ella skaddur.

# Lyklaspælarar ikki við FSV

**Á Toftum er mest sum alt fólkið tókt til stríðið at styrkja møguleikan fyri at røkka bronsukrónunum**

FS Vágar fer á Svangaskarð í morgin. Har hava teir einki serliga góð minni, tí B68 hevur vunnið hvørja ferð, vágamenn hava vitjað.

FSV er aftast, og tað er neyvan í sekstanda umfarinum, at Jonhard Joensen og Albert Ellefsen rokna við at fáa stig. Men nú fáa vit at síggja.

### Ungt lið

Hjá FSV verða onkrir av týdningarmiklastu spælarunum ikki við í morgin.

Ímóti GÍ varð liðformaðurin og stríðsmaðurin á miðvøllinum, Hannus Olsen, so mikið illa skaddur, at tað er sera ivasamt, um hann verður við á Toftum. Tað er greitt, at Ruslan Screlea ikki verður við. Trettan minuttir undan leikloki síðsta sunnudag fekk holli verjuspælarin fimta gula kortið í ár. Tað ber nú annað leikbannið við sær. Torkil Nielsen fekk beinanvegin, tá hann var innkomin síðsta sunnudag, ein snudd í fótablaðið. Hann hevur ikki bjóðað til at vant í vikuni, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður í ferðalagnum um Vestmannasund og á Toftir.

Kim Poulsen hevur ikki verið við tvær tær seinastu ferðirnar, men nú verður hann við aftur.

Liðið hjá FSV er rættuliga ungt. Elsti maðurin, sum er Sonni Johansen, er 27 ára gamal. Allir hinir eru yngri enn so. Tíðliga í vár breyt John Johansen beinið. Tað er greitt, at hann fer ikki at spæla fótbólt aftur í ár.

### Dúva upp á royndirnar

B68 vann 6–1, tá toftamenn fyrr í summar vóru í Miðvági, men teir rokna ikki við so løttum dysti í morgin.. Í B68 eiga teir nógvar royndar spælarar, sum í miðal eru væl eldri, enn fólkið hjá FS Vágum er tað.

Síðsta sunnudag tapti B68 fyri fyrstu ferð í seks dystum. Nú fæst at síggja, um teir fara at megna at koma í aftur góðu stigatorvuna.

Jan C. Dam var leikbannaður ímóti B36. Hann er tøkur aftur. Kristian Poulsen, sum orsaka av skaða, sum hann hevur verið plágaður av síðani í fjør, ikki hevur fingið spælt fyrr enn eftir summarsteðgin, verður kortini ikki við í hópinum hjá B68 í morgin. Mánakvøldið spældu B68 unglingarnir í Gøtu, og tá fekk ungi maðurin reyða kortið. Harvið er hann leikbannaður ímóti FS Vágum.



# Úti fyri árið

**Jóhannis Joensen hevur ikki – sum vit annars hava skrivað - loyvi at spæla fyri HB í seinasta umfarinum av landskappingini**

LEIKBANN
*Jákup Mørk*

Tá vit eftir úrskurðin hjá kappingarnevndini í málinum um leikbannið hjá Jóhannis Joensen skrivaðu, at fýra daga bannið merkir, at Jóhannis fær spælt í seinasta dystinum hjá HB hetta kappingarárið, var hetta ikki heilt rætt.

Støðan hjá Jóhannisi er nevnliga tann, at hann fekk fýra daga leikbann fyri reyða kortið, sum hann fekk í dystinum. Støðan var tó soleiðis, at Jóhannis í dystinum móti NSÍ fekk gult kort, beint áðrenn hann fekk beinleiðis reytt. Hetta var triðja gula kortið hjá honum í ár, og tískil skal hann eisini sita ein dag yvir fyri hetta.

Hetta merkir so, at Jóhannis í dystinum móti B71 seinasta vikuskifti sat leikbann fyri trý gul kort av sær. Seinastu fýra dystirnar, íroknað dystinum mikukvøldið, skal hann so sita bannið fyri reyða kortið av sær.

Niðurstøðan verður sostatt, at Jóhannis longu nú kann fara í vetrarfrí, tá talan er um heimligu fótbóltskappingina.



*Jóhannis Joensen kann longu nú fyrireika seg til at fara í vetrarfrí*

## Skála vann dystin

Dómsnevndin hevur nú endaliga viðgjørt kærumálið um 2. deildardystin millum Skála og HB. Málið snúið seg í stuttum um, at HB hevði nýtt tveir ólógligar leikarar, tá teir vunnu 2-0 á Skála. Skála kærdi – og fekk viðhald – men í HB vildu tey vera við, at tey framman undan høvdu fingið tilsøgn frá FSF um nýtslu av leikarunum, og tískil vildu teir hava nýggjan dyst ásettan.

Hesum ynski hevur dómsnevndin tó ikki gingið á møti, og er Skála tí endaliga dømt at vinna dystin 0-0.

**-jm**

# Daewoo marathon cup 2001

**Samansetta marathon renningin, sum fyri fyrstu varð roynd í fjør, verður aftur á skránni komandi fýra vikuskifitni**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár verður skipa fyri Daewoo Marathon Cup í renning. Henda kapping bleiv roynd fyri fyrstu ferð í fjør og eydnaðist so mikið væl, at fyrireikararnir hava tikið stig til hava kappingina aftur í ár. Tað eru tey trý feløgini fyri frælsan ítrótt, Treysti, Bragdið og Roysnið, sum saman við P/F Esmar Simonsen á Kambsdali, ið selur Daewoo bilar í Føroyum, sum skipa fyri kappingini. Daewoo Marathon Cup er samansett av fýra rennikappingum, ið tilsamans verða 42.195 metrar ella tað sama sum eitt heilt marathon. Seinasta ár vóru tað 10 menn og 2 kvinnur í gjøgnumførdu allar fýra kappingarnar. Í mun til undanfarna ár so er ikki so lang tíð ímillum kappingar í ár, og verða tær tey komandi fýra vikuskiftini í hesi raðfylgju:

| Umfar | Dagur | Teinur | Staður |
|---|---|---|---|
| *Kapping* | | | |
| 1. | 15. sept. | 5 km | Klaksvík |
| *Daewoo Renning* | | | |
| 2. | 22. sept. | 1/2-marathon (21,1 km) | Tórshavn |
| 3. | 29. sept. | 10,5 km | Toftir |
| *Runt Agnið* | | | |
| 4. | 6. okt. | 5,6 km | Kambsdalur |

**Daewoo Renning**

Vinnari av Daewoo Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 42.195 metrar. Kappingin verður skipa fyri bæði kvinnur og menn. Vinnarin fær kr. 500, meðan nr. 2, 3, 4 og 5 fáa ávikavist kr. 400, 300, 200 og 100. Eisini verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3.

### Mini Marathon Cup fyri børn

Sum nakað nýtt verður í ár skipað fyri Daewoo Mini Marathon Cup fyri børn. Daewoo Mini Marathon Cup er eisini samansett av fýra rennikappingum, men verða hesar tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon). Hjá børnunum verður kappast í tveimum aldursbólkum, sum verða 1.-3. flokk og 4.-6. flokk fyri bæði gentur og dreingir. Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 4.219 metrar. Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3. Bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup.

### 1. umfar verður leygardagin

Leygardagin 15. september kl. 12.30 verður fyrsta umfar í Klaksvík, og er tað Ítróttafelagið Treysti, ið skipar fyri. Renningin fer fram úti á Bumshamri, og renna tey vaksnu 5 km eftir Stoksoyravegi, Undir Klakki, Bumshamarvegi og Kelduskákinum - íalt fýra umfør. Børnini renna eitt umfar eftir Torvgøtu, Kelduskákinum og Stoksoyravegi, sum er ein teinur uppá 870 metrar. Byrjan og mál verða heilt úti á endanum á Stoksoyravegi, og tilmelding fer fram á bilverkstaðnum hjá Sp/f Pit-Stop á Bumshamri frá kl. 12.00.

### Eisini renning fyri børn undir skúlaaldur

Í samband við 1. umfar av Daewoo Marathon Cup í Klaksvík, verður eisini skipað fyri renning fyri børn undir skúlaaldur, og verður tað fyri bæði gentur og dreingir. Luttøkugjaldið er kr. 20 fyri bæði børn og vaksin, tó er gjaldið fyri systkin kr. 10 í part. Skráin fyri rennikappingina leygardagin í Klaksvík sær annars soleiðis út:

| Klokkan | | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 12.00 | Tilmelding byrjar | | |
| 12.30 | Vaksin | 4 | 5 km |
| 13.00 | Børn undir skúlaaldur | 1 | 870 m |
| 13.10 | Børn 1.-3. flokk | 1 | 870 m |
| 13.20 | Børn 4.-6. flokk | 1 | 870 m |
| 13.30 | Heiðursmerkjahandan | | |

Fyrireikararnir úr Treystinum leggja dent á, at renningin er fyri øll, og vóna teir at luttøkan verður eins góð, sum hon plagar at vera, tá rennikapping er í Klaksvík. Fyri luttakarar, sum skulu tvørtur um Leirvíksfjørð, kann upplýsast, at Dúgvan siglir av Leirvík kl. 11.10 og av aftur Klaksvík kl.14.20. Tvey tey seinastu árini, skipað hevur verið fyri Daewoo Renning í Klaksvík, hevur luttakaratalið verið 50-60 rennarar.



*Seinasta umfarið av Daewoo renningini verður aftur í ár á Kambsdali*

# Tølini tala

**Av talvuni niðanfyri framgongur, hvussu mótstøðuliðini í dystunum sunnudagin hava staðið seg, tá tey hava leikt móti hvørjum øðrum seinastu 10 árini**

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-NSÍ | 1-0 | 1-3 | 5-1 | 2-0 | - | 5-1 | 2-1 | - | 4-0 | 1-3 | 6-0-2 | 21-9 |
| KÍ-B36 | 2-1 | 3-2 | 1-1 | 2-4 | 1-1 | 2-2 | 1-1 | 0-0 | 2-2 | 3-0 | 3-6-1 | 17-14 |
| HB-EB/S | - | - | - | - | - | - | 4-0 | - | - | - | 1-0-0 | 4-0 |
| VB-B71 | 0-1 | 1-1 | - | 2-0 | 1-0 | 2-6 | - | 0-1 | 1-1 | - | 2-2-3 | 7-10 |
| B68-FSV | 2-0 | - | - | 5-1 | 2-1 | 5-0 | - | - | 4-1 | 1-0 | 6-0-0 | 19-3 |